# TILTØK

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Fríggjakvøldið kl. 20 ungdómsmøti við Bergi D. Joensen. Sunnukvøldið er einki møti, víst verður til møtini heimi í Meinigheitshúsinum.
Heimasíða okkara: www.koma.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Hósdagin kl. 20 byrjar Heimaforbundið aftur við hugnaløtu.
Sunnudagin kl. 11 møti, kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti.
Mánadagin kl. 17 og 19 skótamøtir. Hvønn mikudag kl. 15 bønarmøti. Øll eru vælkomin.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 minnismáltíð Harrans, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 møti.

**Meinigheitin í Hoyvík**
Sunnudagin í Hoyvíkar skúla sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti. Øll eru vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Fríggjadagin kl. 20 í KFUM: Opið hús fyri ung.
Leygardagin kl. 15: KFUM og KFUK fara túr úti á Reyni, Nicolina Højgaard sigur frá. Vit møtast í túninum við Havnar kirkju og Samvinnufelagið. Túrurin er eisini fyri ung.

**»Tíð til Gud«**
Vit koma saman úti í Pállsstovu sunnukvøldið kl. 21.
Tema: Máttmikil bøn. Evni: Týdningurin av at bróta ígjøgnum í bønini. Aftaná er drekkamuður. Verið hjartaliga vælkomin.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 breyðbróting, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 møtirøðin við M. Carragher heldur áfram, kl. 21 útimøti.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Guds dómstími, kl. 11 gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Meinigheitshúsið**
3.-9. sept. Missiónsmøtirøð við Gunnar Hamnøy, trúboðara úr Noregi. Barnaansing verður øll kvøldini.
Fríggjakvøldið kl. 20 møti v/ G. Hamnøy, Laila Højgaard syngur.
Leygarkvøldið kl. 20 møti v/ G. Hamnøy, Magni Christiansen syngur.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti v/ G. Hamnøy, Manskórið syngur.
Mánakvøldið kl. 20 Manskórið venur.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í kvøld kl. 21 ungdómsmøti, í morgin kl. 17 landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti v/ Símun Absalonsen, kl. 18 kvøldmøti v/ Alex O´Campo, kl. 22 útimøti v/ Samkomuni í Hoyvík.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin einki møti, vegna møti í Filadelfia í Miðvági.

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Sjómanskvinnuringurin í Havn**
kemur saman á Sjómansheiminum mánakvøldið 10. sept. kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsinstænasta v/ kommunitión í Kerit. Hósdagin kl. 20 verður Taizé-kvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taizé) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Leygardagin kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 hámessa v/ Paul Marx O.M.I. í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.

**Saron, Vestmanna**
Leygardagin kl. 16 samkomufundur. Sunnudagin kl. 11 morgunmøti v/ breyðbróting.
Mánadagin kl. 20 Bíbil- og bønarmøti.

**Filadelfia, Sundalagi**
Sunnukvøldið kl. 18.30-21.15 Alpha-skeið.

**Karmel, Eiði**
Møtirøðin heldur fram í kvøld kl. 20 v/ Sigfred Johannesen og øðrum. Jóhanna, Hallgerð og Marita syngja. Kl. 17.30 verður bønarløta. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús við Arna Abrahamsen.
Sunnudagin kl. 17 møti við Símuni Absalonsen. Kl. 17 barnamøti. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Ørkin, Saltangará**
Evangel. møti verður sunnudagin kl. 17. Húsmøti verður týsdagin kl. 19 hjá Jonnu og Palla Højgaard, Saltangará. Verið hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð**
Møti verður sunnudagin kl. 10.30 við Palla Højgaard. Øll eru vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Mikumorgunin kl. 6 bøn.
Leygarmorgunin kl. 9 bøn saman við Getsemane.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli og kl. 18 møti, Osbjørn Joensen talar.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður í Bøgøtu 3 fríggjakvøldið 7. sept. kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 17.30 lovsongsløta, kl. 18 møti.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður fríggjakvøldið kl. 21.
Sunnudagsskúlin møtir í missiónshúsinum sunnudagin kl. 14, farið verður til Hvalbiar í sunnudagsskúli.
Foreldur biðjast hjálpa til við koyring. Sunnukvøldið kl. 18 møti við Terja og Birgit. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Café One Way, Tvøroyri**
Fríggjakvøldið verður opið kl. 21.00.
Leygarkvøldið kl. 21 hittast ung og vísa film.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti, Sámal Jákup Joensen talar.
Mánadagin kl. 20 Heimaforbundið.

**Betania, Sumba**
Møti verður í kvøld, leygar- og sunnukvøldið kl. 20.00. Osvald Kjærbo talar.

**Missiónshúsið í Sumba**
Sunnukvøldið kl. 18 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag kl. 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 3.9.*
kl. 10-10.15 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.15 Ítriv í kjallaranum. Seyma fýrkantar saman til teppir til Móðir Tehresu felagsskapin. Kostspæl, telving og onnur spøl. **Tilm. til døgurðan mikudagin tlf. 316491 kostnaður.**
*Týsdagin 4.9.*
kl. 10-12 Vit baka
**Kvøldseta kl. 19.** Gunhild Michelsen syngur og sigur frá um Kingosangin. Vitjan úr DK av Ældre på Højskole i Udlandet.
*Mikudagin 5.9.*
kl. 10-12 Fyrireiking til døgurðan
kl. 15 Døgurði
Túrur
*Hósdagin 6.9.*
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 7.9.*
kl. 10-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Leygardagin 8. sept. kl. 15 verður lættur gongutúrur av Kallanesi til Akkersvík. Farið verður av bussteðgiplássinum á Hvítanesi. Havið góð og heit gonguklæði og drekkamunn við. Tilmelding.

**Eysturoyar Gongufelag/- Kunningarstova**
Gongutúrur verður **niðan á Borgarfelli** sunnudagin 9. sept. Gingið verður frá Ítróttarhøllini á Skála kl. 14.30. Ferðaleiðari: Kaj Olsen.
Túrurin er miðal. Tekning á tlf. 449449.
Gongutúrur verður **niðan á Egg** sunnudagin 9. september. Vit møtast við kirkjugarðin í Elduvík og við skúlan í Oyndarfirði kl. 14.30. Túrurin er miðal úr Elduvík og lættur úr Oyndarfirði.

**Sunda Pensionistafelag**
Hugnakvøld verður í Bygdahúsinum í Hósvík mánakvøldið 10. sept. kl. 19.00.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21 og 22.30-23.30.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin mánadag kl. 14-18 og hósdag kl. 14-20.
Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International, Føroya deild**
*Tinghúsvegur 18, 4. hædd*
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
*tlf. 21 04 95.*
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**MBF**
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00. Vit hava stongt vegna summarfrí frá 5. juli til 15. august.
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail: mbf@post.olivant.fo

**Giktafelag Føroya**
*Íslandsvegur 10 C*
*100 Tórshavn*
*Tlf. 310237 · Fax 310813*
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin týs- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Javni**
*Hoydalsvegur 40*
*3. hædd (ovast).*
Skrivstovan er opin týs-, miku- og hósdag kl. 10-14.
Fríggjadag kl. 13-16.
Tlf. 314827 · fax 310557
email: javni@post.olivant.fo

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.

**Cøliakifelag Føroya**
*Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum:
Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Nýrafelagið**
*Postsmoga 1063*
*110 Tórshavn.*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Evangeliska Røddin, Odense**
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin«**
er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10 og verður endursend sunnukvøld kl. 20.30.

**Malta, Hirtshals**
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

**Kristnastova**
*Birmavej 36, København S,*
tlf. 32551809 fax.32586149
e-mail: kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20. Møti við breyðbróting er hvønn sunnumorgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis.
Bussarnir 5, 9, 12, 13, 37, 38 steðga nærhendis.

**Føroyskt møti í Ålborg**
Føroysk møti eru fyrsta leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin. Tit vælkomin at ringja til Annfinn Hjelm, tlf. 29725733.

**Føroyahúsið í Keypmannahavn**
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Telefonupplýsing: 33231586
Dagliga telefonin: 33231587
Fax 33231588
E-mail addressa: postur@faroehouse.dk
Heimasíðan: www.faroehouse.dk
Á heimasíðuni er skráin, smátíðindi, feløgini og links víða um.
Kaffistovan er opin má.- frí. kl. 14 - 19
Bókasavnið um somu tíð.
Føroyskur døgverðamatur, fløgur, bøkur og pløgg fáast til keyps.
Vilt tú leiga ella skipa fyri tiltaki í húsinum, vendir tú tær til leiðaran.

**Føroyskt barnamøti**
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Før. gudstænasturnar í Samuelskirkjuni**
Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14. (Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

**Føroyingafelagið í Esbjerg**
*Danmarksgade 25,*
*6700 Esbjerg,*
*tlf. 75132747*
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

**Føroyska nærvarpið í Esbjerg**
Føroyska sendingin »v/Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11 og verður endursend kl. 16.



## FILMSTEIGURIN

# Shrek

Tað var einaferð eitt trøll, sum livdi í einsemi í mýrulendi. Trøllið Shrek fekk sjáldan vitjan uttan frá illum bóndum, sum vildu taka lívið av sær. Shrek hevði tó ikki torført við at reka teir burturaftur.

Ein dagin streyma løgin djór, sum bara eru kend úr ævintýrum, til mýrulendið. Tá Shrek dámar væl at vera einsamallur, kærir hann sína neyð til greivan Farquaad, sum hevur stongt øll ævintýrdjórini inni í mýrulendinum.

Greivin játtar at geva Shrek mýrulendið aftur, men bara um Shrek ger honum eina tænastu. Tað er at fría eina prinsessu, sum er fangað hjá einum óndum dreka, og føra hana til Farquaad, so hann kann gerast ein ordiligur kongur.

Við á ferðini hjá Shrek er eitt esil, sum ongantíð heldur munn. Teir báðir skulu bjarga prinsessuni frá drekanum, og tað eydnast. Síðani skulu teir føra hana aftur til tann ónda greivan.

Soleiðis koma tey aftur til borgina, men tey hava eina dulda ætlan.





# The Watcher

Ein hópdrápsmaður herjar í Chicago. Hann velur sær eina unga kvinnu sum tað næsta offrið og hevur eyguni við henni allatíðina. So at hann veit, nær hon arbeiðir og nær hon kemur heim. Nær hon svevur og nær hon er á fótum.

Joel Campbell kennir arbeiðslagið hjá honum sum sín egna lumma, men tað er til onga nyttu. Hann hevur ongantíð kunna sagt, hvør næsta offrið hjá drápsmanninum er. Og tað endaði galið, tá næsta offrið var ein vinkona hjá Joel.

Trýstið hevur sett síni spor. Joel er ikki longur tann dugnaligi løgreglumaðurin, hann einaferð var. Hann býr í eini íbúð í Chicago, sum mest er átøk einum svínastalli, og einasta ljósa løtan í vikuni er vitjanin til sálarfrøðingin, Polly.

Men alt fer at broytast. Gamli kenningurin, sum er hópdrápsmaðurin, er farin at keða seg og fer tí til Chicago at drepa fyri eygunum á Joel, sum fær 24 tímar at finna útav, hvar næsta offrið er.

Hópdrápsmaðurin krevur at tosa við Joel, tá jagstranin eftir honum einaferð er byrjað. Joel fær nú nýggja meining í lívinum og hann er sum ein nýggjur maður. Joel hevur tørv á einum ávísum máli, og tað er júst hópdrápsmaðurin.

Hetta er kettan eftir músini, og at enda er bara ein teirra á lívi.





**Frumsýning**
**Billettprísur: Vaksin: 55,- kr. – Børn: 45,- kr.**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 07.09. kl. $17^{00}$ | Fríggjadagin | 07.09. | kl. $19^{00}$ |
| Fríggjadagin | 07.09. kl. $20^{30}$ | Leygardagin | 08.09. | kl. $17^{00}$ |
| Leygardagin | 08.09. kl. $19^{00}$ | Leygardagin | 08.09. | kl. $20^{30}$ |
| Sunnudagin | 09.09. kl. $16^{15}$ | Sunnudagin | 09.09. | kl. $18^{15}$ |
| Sunnudagin | 09.09. kl. $19^{30}$ | | | |

**www.in.fo/havnarbio**

HAVNAR BIO
Tlf. 3119 56




**Frumsýning**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 07.09. kl. $23^{30}$ | Leygardagin | 08.09. | kl. $23^{30}$ |
| Sunnudagin | 09.09. kl. $22^{30}$ | | | |




| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 07.09. kl. $21^{15}$ | Leygardagin | 08.09. | kl. $21^{15}$ |
| Sunnudagin | 09.09. kl. $20^{15}$ | | | |




| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 07.09. kl. $17^{30}$ | Fríggjadagin | 07.09. | kl. $22^{45}$ |
| Leygardagin | 08.09. kl. $17^{30}$ | Leygardagin | 08.09. | kl. $22^{45}$ |
| Sunnudagin | 09.09. kl. $17^{00}$ | Sunnudagin | 09.09. | kl. $21^{45}$ |